Nólsoyar Pálsgøta 32
700 Klaksvík
Tlf. 410000 Fax 410001

Ár 2013, hin 24. apríl kl. 17:30 hevði Klaksvíkar Býráð fund, har hesir limir møttu:
Jógvan Skorheim, Óluva Klettskarð, Jóhann Lützen, Signhild V. Johannesen, Kristian Eli Zachariasen, Gunvá við Keldu, Eyðstein Ó. Poulsen, Atli S. Justinussen og Herfrí J. Sørensen. Steinbjørn O. Jacobsen gav avboð.
Onnur: Tummas Eliasen, kommunustjóri, og Jensa Anthoniussen, protokollførari.

2013/095.
12/00793 Serstøk byggisamtykt fyri miðbýarøkið

Frágreiðing um málið:
Í skrivi frá Teknisku Umsiting, dagfest 11. apríl 2013, verður greitt frá málinum.
Málið hevur ligið til almenna framløgu, og kærufreistin var úti 14. februar 2013. Í kærutíðini kom ein kæra inn (sí skjal I).
Býarskipanarbólkurin hevur umrøtt málið við SNArkitektar, sum hava virkað sum ráðgevandi arkitektafyritøka hjá kommununi í miðbýarhøpi. Ráðgevararnir lótu kommununi upprit í samband við hesa kæru (sí skjal II).

Tilmæli:
Býarskipanarbólkurin tekur undir við niðurstøðuni í uppritinum og mælir býráðnum til endaliga at samtykkja serstøku byggisamtyktina og uppatliggjandi byggisamtyktarbroytingar, sum tær vórðu samtyktar á býráðsfundi 11. september 2012 og lýstar og framlagdar alment í januar/februar 2013.

BBN 15. apríl 2013: Kristian Eli Zachariasen, Gunvá við Keldu og Elsebeth M. Gunnleygsdóttur taka undir við tilmælinum frá teknisku umsiting tann 11. apríl 2013. Signhild V. Johannesen og Jóhann Lützen taka støðu í býráðnum.

FeN 16. apríl 2013: Nevndin tekur undir við tí ferðsluliga partinum.

HaVN 16. apríl 2013: Nevndin tekur undir við meirilutanum í BbN dagf. 15. apríl 2013 og FeN dagf. 16. apríl 2013.

MeN 16. apríl 2013: Ein meirluti, Signhild V. Johannesen, Óluva Klettskarð, Gunvá við Keldu og Atli S. Justinussen, tekur undir BBN 15.04.13. Ein minniluti, Jóhann Lützen, tekur støðu í býráðnum.

SoN 16. apríl 2013: Vísandi til týdningin av málinum heitir nevndin á borgarstjóran og formannin í Byggi- og Býarskipanarnevndini um, áðrenn býráðsfundin, at taka fund við kæraran til tess at tryggja allar neyðugar upplýsingar, áðrenn endalig støða kann takast til málið á býráðsfundinum.

TN 17. apríl 2013: Ein meiriluti í nevndini, Steinbjørn O. Jacobsen, Kristian Eli Zachariasen, Gunvá við Keldu og Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur, tekur undir við meirilutanum í BbN dagf. 15.apríl 2013, viðtøkuni hjá HaVN dagf. 16. apríl 2013, meirilutanum í MeN dagf. 16. apríl 2013 og viðtøkuni hjá SoN dagf. 16. apríl 2013. Ein minniluti, Jóhan Lützen, tekur undir við viðtøkuni hjá SoN dagf. 16. apríl 2013.

HeiUN 17. apríl 2013: HeiUN tekur undir við meirilutanum hjá BBN 15.4.2013 og við Sosialu Nevnd 16.04.2013

FíN 23. apríl 2013: Nevndin tekur undir við tilmælinum frá teknisku umsiting, dagfest 11. apríl 2013, og vil hava eina óhefta løgfrøðiliga meting av málinum.

Býráðsins samtykt:
Eitt samt býráð tekur undir við meirilutanum í BBN 15. apríl 2013, FeN 16. apríl 2013, HaVN 16. apríl 2013, meirilutanum í MeN 16. apríl 2013, meirilutanum í TN 17. apríl 2013, HeiUN 17. apríl 2013 og FíN 23. apríl 2013.

2013/096.
13/00176 Endurskoðan av grundstykkjaliastanum

Frágreiðing um málið:
Víst verður til skriv frá Teknisku Umsiting, dagfest 9. apríl 2013, har m.a. greitt verður frá, at kommunan liggur inni við uml. 50 óbygdum grundøkjum, og at á grundstykkjalistanum standa í dag uml. 300 nøvn. Øll á Klaksvíkslistanum hava fingið tilboð um stykki minst eina ferð. Sambært reglugerðini kann umsøkjari fáa tilboð um stykki tríggjar ferðir, áðrenn hann verður strikaður av listanum.
Seinastu árini hevur umsitingin staðfest, at flestu av umsøkjarunum ikki taka av tilboðnum um stykki, tá hetta stendur teimum í boði. Orsøkirnar eru ymiskar, men vantandi møguleikar fyri fígging hava verið serliga týðiligar.
Fyri at fáa ein meira realistiskan bíðilista, er uppskot frammi um at broyta reglugerðina. Uppskotið gongur út uppá, at fyri at verða skrásettur á listanum, skal umsøkjarin gjalda eina ávísa upphædd – t.d. kr. 5000,-, sum so verður drigin frá keypsprísinum, tá umsøkjarin fær tillutað stykki. Velur umsøkjari av eini ella aðrari orsøk at lata seg strika av aftur listanum, verður upphæddin goldin aftur uttan rentur.

Tilmæli:
Verður reglugerðin broytt sambært fyriliggjandi uppskoti, mælir tekniska umsiting til, at øll á grundstykkjalistanum fáa bræv við kunning um, at grundstykkjalistin er strikaður, men at tey hava møguleika at verða sett á nýggja listan í somu kronologisku røð, sum tey standa í dag, um tey - áðrenn tveir mánaðar frá dagfesting av brævinum – hava goldið kommununi kr. 5000,-.
Tá nýggja reglugerðin er samtykt, fáa allir nýggir umsøkjarar at vita, at umsóknin verður skrásett eftir tí degi, flytingin uppá kr. 5000,- er móttikin (sí uppskot til broytta reglugerð á skjali I).

Fíggjarligar avleiðingar:
Av tí at talan er um eitt forskotsgjald uppá grundøki, verður ikki talan um nakra beinleiðis fíggjarliga broyting í mun til í dag.

TN 17. apríl 2013: Nevndin tekur undir við tilmæli frá TU dagf. 9. apríl 2013 men mælir til, at depositumið verður kr. 2.500,-.

FíN 23. apríl 2013: Nevndin tekur undir við tilmælinum frá teknisku umsiting, dagfest 9. apríl 2013.

Býráðsins samtykt:
Samtykt at taka undir við tilmælinum frá FíN 23. apríl 2013 við seks atvøðum fyri (JS, KEZ, SVJ, ÓK, ASJ og EÓP), ongari atkvøðu ímóti og tríggjar blankar (HJS, JL og GvK).

2013/097.
13/00130 Rakstur av hallunum eftir yvirtøku – sambygging

Frágreiðing um málið:
Víst verður til skriv frá Mentanardeildini, dagfest 12. apríl 2013, har greitt verður frá sambyggingini av hallunum. Serkrøv og ynskir í sambandi við tekju, útveggir, hurðar, út- og neyðljósskipan og goymsluøki hava ført við sær eina dýrkan av verkætlanini. Metti kostnaðurin 350 tús. kr.

Tilmæli
Mælt verður til, at byggingin verður fíggjað soleiðis:
1. kr. 70.000,- av *Fish Fair*
2. kr. 50.000,- av *Stadionøkið*
3. kr. 50.000,- av *Fastognir*
4. kr. 180.000,- av *Játtanini til hallirnar*
5. at møguligur óvæntaður meirkostnaður verður borin av *Játtanini til hallirnar*

MeN 16. apríl 2013: Ein meiriluti, Signhild V. Johannesen, Jóhann Lützen, Óluva Klettskarð, Atli S. Justinussen, tekur undir við tilmæli frá Mentanardeildini 12. apríl 2013.
Ein minniluti, Gunvá við Keldu, tekur undir við málinum men mælir frá, at kr. 50.000,- verða játtaðar av "*Fastognir*" – peningurin verður at játta av aðrari konto.

TN 17. apríl 2013: Nevndin mælir frá, at peningur verður tikin av konto til fastognir.

FíN 23. apríl 2013: Nevndin tekur undir við málinum vísandi til teldupost frá býarverkfrøðinginum 22. apríl 2013.

Býráðsins samtykt:
Samtykt at taka undir við Fíggjarnevndini 23. apríl 2013.

2013/098.
12/01162 Val av limum í Stýrið fyri Sjálvsognarstovnin Atlantis

Frágreiðing um málið:
Sambært grein 3 um leiðslu í viðtøkunum fyri grunnin Mentanarhúsið Atlantis verður grunnurin umsitin av einum stýri við trimum limum, sum eru valdir soleiðis: NFÍ velur ein lim, Virkishúsið fyri Ung í Klaksvík (Húsið) velur ein lim, og Klaksvíkar Handilsfelag velur ein lim. Limirnir verða valdir fyri fýra ár í senn, og verða valdir í mars mánað, aftaná eitt býráðsval.

Tilmæli:
Í tilmælinum frá Mentanardeildini, dagfest 12. apríl 2013, verður mælt til, at stýrið verður valt soleiðis, og reglugerðin broytt tilsvarandi:
1. NFÍ velur ein lim,
2. leigararnir í Atlantis velja ein lim, og
3. Klaksvíkar Býráð velur ein lim.

MeN 16. apríl 2013: Nevndin tekur undir við tilmæli frá Mentanardeildini 12.04.2013.
- *Atli S. Justinussen luttók ikki í viðgerðini av málinum.*

FíN 23. apríl 2013: *Atli S. Justinussen luttók ikki í viðgerðini av málinum*. Nevndin tekur undir við Mentanarnevndini 16. apríl 2013.

Býráðsins samtykt:
Atli Justinussen luttók ikki í viðgerðini av málinum vegna ógegni.
Jóhann Lutzen valdur í stýrið.

2013/099.
12/00621 Nýtt Blákrossheim

Frágreiðing um málið:
Víst verður til skriv frá Trivnaðardeildini, dagfest 12. apríl 2013, har m.a. verður staðfest, at nýggjar upplýsingar vísa, at byggingin ikki verður liðug innan 25. juni 2013. Tí verður málið lagt fyri til nýggja politiska støðutakan.

SoN 16. apríl 2013: Nevndin mælir til, at tilsøgnin um stuðulin, við teimum samtyktu treytunum, verður longd til í seinasta lagi 31. desember 2016.

FíN 23. apríl 2013: Nevndin tekur undir við Sosialu Nevnd 16. apríl 2013.

Býráðsins samtykt:
Samtykt.

2013/100.
13/00060 Víðkan av goymslurúmi í trappugongd í Sambýlinum á Heygnum - *eykajáttan, fyrra viðgerð*

Frágreiðing um málið:
Víst verður til skriv frá Trivnaðardeildini, dagfest 12. apríl 2013, har greitt verður frá málsgongdini. Sambært upplýsingum frá ráðgevandi eftirlitinum við arbeiðinum eru írestandi veitingarnar, sum eru eftir at gjalda, umleið kr. 80.000,-. Fígging av hesum er fingin til vega umvegis "Vistarheimsbókina", sum hevur flutt kommununi kr. 220.000,-. Avlopspeningurin frá "Vistarheimsbókini" verður við til at fíggja onnur mál í Sambýlinum á Heygnum: 11/00859, har kr. 50.000,- skulu nýtast til klokkuskipan, mál 13/00234 har kr. 20.000,- skulu nýtast til ymsan stuðul, og mál 13/00364, har kr. 10.000,- skulu nýtast til ymsar ábøtur og amboð.

Tilmæli:
Her er sostatt talan um eina eyka inntøku hjá kommununi á kr. 220.000,-, sum kommunan fær av einari uppsparing hjá Vistarheimsnevndini, til nýtslu innan Trivnaðarøkið. Hóast eykainntøkan fíggjar nevndu nýggju útreiðslur, so verður hetta bókhaldsliga mett sum ein eykajáttan, ið sostatt krevur at verða løgd fyri býráðið í tveimum umførum, og har landsstýrið verður kunnað eftirfylgjandi.
Málið verður tí lagt fyri fíggjarnevndina og síðan fyri býráðið við umbøn um eykajáttan, ið verður fíggjað av nevndu eykainntøkum.

SoN 16. apríl 2013: Nevndin tekur undir við tilmælinum frá Trivnaðardeildini, dagfest 12. apríl 2013.

FíN 23. apríl 2013: Nevndin tekur undir við Sosialu Nevnd 16. apríl 2013.

Býráðsins samtykt:
Samtykt.

2013/101.
13/00329 Navn til atkomuvegin til nýggja røktarheimið

Frágreiðing um málið:
Víst verður til samtykt í Gøtunavnanevndini, dagfest 15. apríl 2013, har mælt verður til, at atkomuvegurin til nýggja Røktarheimið fær navnið Sævargøta, og túnið millum hendan vegin og Klaksvíksvegin fær navnið Sævartún.

GøtuN 15. apríl 2013: Nevndin mælir til, at atkomuvegurin til nýggja røktarheimið fær navnið *Sævargøta*, og túnið millum hendan vegin og Klaksvíksvegin fær navnið *Sævartún*.

TN 17. apríl 2013: Nevndin tekur undir við Gøtunavnanevndini dagf. 15. apríl 2013.

Býráðsins samtykt:
Samtykt.

2013/102.
12/00981 Navn til nýggja røktarheimið

Frágreiðing um málið:
Nýggja røktarheimið, ið er í gerð og væntandi verður liðugt og klárt at taka í nýtslu seinni í ár, skal hava eitt navn. Gøtunavnanevnd býráðsins hevur havt málið til viðgerðar og er komin við uppskoti til navn. Mentanarnevndin, Sosiala Nevnd og Tekniska Nevnd hava eisini havt málið til viðgerðar, og eru tær samdar um, at navnakapping eigur at verða útskrivað.

Tilmæli:
Mælt verður til at skriva út navnakapping í málinum.

MeN 16. apríl 2013: Nevndin mælir til, at navnakapping verður útskrivað í málinum.

SoN 16. apríl 2013: Nevndin tekur undir við tilmælinum frá Mentanarnevndini 16. apríl 2013.

TN 17. apríl 2013: Nevndin tekur undir við viðtøkuni hjá MeN dagf. 16. apríl 2013.

Býráðsins samtykt:
Samtykt.

FRAMMANFYRI STANDANDI MÁL ERU VIÐGJØRD Á ALMENNUM FUNDI